STARVSLÝSING

## Maskinlærlingur

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi maskinlærlingi til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja 1. januar, 2007. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

Arbeiðsuppgávur
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá Landsverki.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært lærlingasáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag & Landsfelag Handverkanna og Føroya Arbeiðsgevarafelag & Føroya Handverksmeistarafelag. Lærutíðin er 4 ár og endar við eini sveinaroynd.

Umsóknir
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. desember, 2006.

Merk umsóknina „Umsókn maskinlærlingur“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Johan Hansen, smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

# SWOT turns you on?

## TRYGD leitar eftir fólki til marknaðardeildina.

**STARVIÐ**
Talan er um spennandi starv, har nakrar av uppgávum tínum verða at greina analysur, standa á odda fyri verkætlanum, røkja menningar- og marknaðarvirksemi, styrkja og umsita samskifti við handilsfelagar og at menna og fremja handilsanalysur, bæði internar og eksternar.

**TÚ**
Tú hevur hægri útbúgving í búskapi ella marknaðarføring, trý til fimm ára starvsroyndir í marknaðarrøkt og marknaðarmenning og dugir væl føroyskt, enskt og danskt. Tú dugir somuleiðis væl at raðfesta og at halda ásettar freistir, ert framtøkin, arbeiðir sjálvstøðugt, sært tað skilagóða í broytingum og hevur ein fínan sans fyri handilslívi.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Finansforbundet. Vit vilja seta starvið sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Skrivlig umsókn við curriculum vitae og viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi innan 11. desember 2006. Send umsóknina til P/f Trygd, Att.: Ali Celebi, Gongin 7, Postboks 44, 110 Tórshavn, ella til ace@trygd.fo.

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 30 fólk, og vit umseta í dag fyri meira enn 70 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

**LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO**
**UMSÓKNARFREIST ER 11. DES. 2006**

TRYGD
leitar eftir tær.

REPROZ

# Lýggja veðrið heldur sær



**November mánaður var merktur av avfalli og lýggjum veðri. Alt bendir á, at ársins seinasti mánaður heldur fram eftir sama leisti.**

VEÐUR
*Snorri Brend*

- Tað verður framvegis lýtt, sigur veðurmaðurin Petur Skeel, meðan hann eygleiðir veðurforsøgnirnar fyri teir komandi dagarnar.

– Hitin fer at liggja millum 6 og 11 stig teir komandi dagarnar.

Leygardagurin verður heilt hampiligur til veður. Út á kvøldið fer hann kortini at vaksa vindin nakað av suðri, og tað heldur hann fram við sunnudagin.

Sunnudagin verður nevniliga nógvur vindur, kanska upp í storm av eystri við regni.

- Men seinnapartin verður væntandi turt, sigur veðurmaðurin.

Mánadagin sær út til at onkrir sólarglottar fara at verða, eins og nakað av ælingi. Hitin verður millum 6 og 9 stig.

Týsdagin hækkar hann nakað, og tað fer eisini at merkjast á hitastigunum, sum – øvugt ættini – fara at lækka nakað.

Annars vísir eitt yvirlit frá Dansk Meteorologisk Institutt at mesti hitin í farna mánaði var 11,2 stig, meðan tann lægsti var niðanfyri frostmarkið, - 0,9 stig. Miðalhitin var annars 6,5 stig sum var væl nærum 2 stig hægri enn miðaltalið frá 1961-1990 sum var 4,6 stig.

Farna mánaðin vóru 234 mm í avfalli, sum var nærum dupult so nógv sum miðaltalið, 127 mm.